


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í DESEMBER M.A.:

**3. des.** Luttøka í jólatiltaki hjá amerikanska sendiharranum.

**5. des.** Taka lut í jólahaldi hjá norsku sendikvinnuni.

**6. des.** Móttøka hjá finsku sendikvinnuni í sambandi við finska sjálvsstýrisdagin.

**8. des.** Taka lut í jólahaldinum, sum føroyingafelagið skipar fyri og í føroysku gudstænastuni við Jógvani Fríðrikssyni, bispi og Hera Joensen, presti.

**10. des.** taka lut í seminari hjá íslendska Uttanríkisráðnum og íslendska felagnum fyri menniskjarættindi: “Human rights and the role of small states in the global arena”

**12. des.** móttøka hjá Sigurði Inga Jóhannssyni, norðurlendskum samstarvsráðharra, í sambandi við at ísl. formannskapurin í Norðurlanda ráðharraráðnum er komin at enda

**16. des.** døgurði hjá japanska sendiharranum.

## FRÁGREIÐING FRÁ FRAMTÍÐARNEVND FORSÆTISRÁÐHARRANS

Fyrsta frágreiðingin fevnir um menning av vinnulívi, umhvørvi, landsparta og fólkafrøðiligum viðurskiftum.

Forsætisráðharrin setti framtíðarnevndina miðskeiðis í fjør við tí

*»endamáli, at kjakast um avbjóðingarnar og møguleikarnar, orsakað av tøkniligu broytingini. Framtíðarnevndin hjá forsætisráðharranum hevur m.a. til uppgávu at kjakast um menningina av týdningarmiklum rákum, sum koma at hava myndandi ávirkan á samfelagið í framtíðini, serliga við atliti at gongdini í umhvørvismálum og fólkafrøðiligum tættum.«*

Høvuðsniðurstøðurnar og tilmælini hjá nevndini eru:

- Tað eigur at verða umhugsað um grundútbúgving og lívlong læring eiga at renna saman til eina liðiliga útbúgving
- Krøv til arbeiðsmegi og førleikar eigur regluliga at verða eyðmerkt
- Tað er umráðandi, at lóggávan fylgir menningini á arbeiðsmarknaðinum og uppgávunum hjá búskapinum, so rættindini hjá einstaklinginum kann verjast, uttan at forða fyri nýskapan
- Inntøkurnar hjá landinum skulu alsamt endurskoðast í ljósinum av broyttum skattagrundarlagi, orsakað av øking í altjóðagerðini og broytingum á arbeiðsmarknaðinum
- Fjølbroytni í vinnulívinum og burðardygga nýtslu av tilfeinginum, er grundleggjandi fyri langtíðar støðufesti.
- Tørvur er á at greina betri sjálvvirkandi kollveltingina í landsbygdunum og viðkvæmum bygdum




*Mynd 1. Fyrsta frágreiðing frá framtíðarnevnd forsætisráðharrans er komin.*

- Broytt aldursbýti í landinum saman við broytingum í streyminum av fólkum millum lond, skapa samfelagsligar avbjóðingar, sum mugu loysast

Frágreiðingin nevnir, at tað er umráðandi fyri stjórnina at taka hesar niðurstøður við í politikkin og lóggávuna í komandi árum, tí lítar broytingar nú, kunnu avmarka tørvin á størri broytingum í framtíðini.

Fram kemur eisini í frágreiðingini, at broytingar frameftir kunnu hava við sær ymsar pallmyndir í framtíðini alt eftir, hvussu hesar vilja vísa seg. Frágreiðingin vísir á, hvør uttanhýsis drívmegi mest sannlíkt fer at hava týðandi ávirkan á menningina av tí íslendska samfelagnum tey komandi áratíggjuni, bæði ja- og neiligar avleiðingar. Alt eftir hvussu stjórnin tekur hetta til sín og viðger innanhýsis drívmegina, fer hetta at hava stóra ávirkan á, hvussu samfelagið mennir seg. Víst verður á, at tann drívmegi, sum hevur størstu ávirkanina, er fleksibilitetur - fleksibilitetur í búskapinum, útbúgving og arbeiði, búseting og lívsháttum.

*Sí meira her (á íslendskum) og frágreiðing her (á íslendskum)*

## TILTØK FYRI AT ØKJA ÁLITIÐ Á ÍSLENDSKT VINNULÍV

Íslendska stjórnin hevur tikið avgerð um at taka stig til sjey ymisk átøk, fyri at økja um álitið á íslendska vinnulívið (í ljósinum av Samherja málinum). Átøkini eru hesi (nøkur dømi úr heildini eru nevnd undir hvørjum punkti):



*Mynd 2. Íslendska forsætisráðið.*

i. Økja gjøgnumskygni í rakstrinum í størri, ikki børsskrásettum fyritøkum

Hetta fevnir m.a. um størri upplýsingarkrøv hjá lutfalsliga stórum fyritøkum, sum hava eina systematiska ávirkan á íslendska búskapin. Hetta er í tráð við nýggju ráðgevingina hjá IMF (International Monetary Fund - altjóða gjaldoyrisgrunnurin)

ii. Økja gjøgnumskygni í rakstrinum av størri fyritøkum í fiskivinnuni

Krøvini omanfyri (punkt i.) galda allar fyritøkur í øllum vinnugreinum. Fiskimálaráðharrin hevur biðið um, at hetta arbeiði fevnir um eina serliga kanning av, hvørt størri krøv eiga at verða sett viðvíkjandi gjøgnumskygni til størri fiskivinnufyritøkur

iii. Fremja meting og betran av altjóða fiskiskapi

Hetta hevur m.a. við sær, at fiski- og landbúnaðarmálaráðharrin vil seta seg í samband við FAO (Food and Agriculture Organization of the United Nations - matvøru- og landbúnaðarfelagsskapin hjá Sameindu Tjóðum) fyri at gera meting av vinnusiðum í fiskivinnufyritøkum, sum

fiska og handla við fiskakvotum, eisini í menningarlondum. Síðan kemur FAO við uppskotum um hættir til at betra stríðið móti siðspillu, mutri og hvítting av peningini.

iv. Fremja grannskoðan av tilknýttum fyritøkum við árslok

Fiskimálaráðharrin hevur heitt á nevnd, sum áður hevur gjørt frágreiðing um betring av yvirvøku av tilfeinginum av fiski, um at koma við uppskotum innan árslok um, hvussu eftirlitið við fiskarínum og avreiðingini kann fara fram

v. Tryggja meiri fígging til skattakanningar

Ymiskt er komið fram, sum krevur gjøllari kanning av Skattarannsóknarstjóranum ("Skattrannsóknarstjóra") og Ríkisskattastjóranum ("Ríkisskattstjóra"). Við støði í vavinum og tí torgreidda í slíkum málum, hevur ríkisstjórnin gjørt av, at stovnarnir tíðaravmarkað kunna økja starvsliðið, fyri at kunna fáa útint hesar uppgávur so skjótt og væl, sum gjørligt.

vi. Forða fyri áhugamálsósemju og mutur

Í forsetaskrivstovuni verður arbeitt við reformering av øktum gjøgnumskygni og áliti, m.a. broyting í lógini um alment innlit, eitt lógaruppskot um vernd av teimum, sum lata upplýsingar (varskógvarar) og eitt lógaruppskot um forðing fyri áhugamálsósemju. Løgmálaráðharrin arbeiðir við lóggávum, altjóða avtalum og mutri og hvítting av peningi. Fígging av kanningini hjá statsákæranum ("héraðssaksóknara") av Samherjamálinum varð eisini tikið upp á mál.

vii. Reaktión uttanlands

Íslendska Uttanríkisráðið fylgir væl við altjóða umrøðuni av Samherja málinum og hevur fyrireikað seg til, hvussu tað skal reagera, um umdømi Íslands verður neiliga ávirkað.

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á enskum)*

## NÝTT TJÓÐARBÚSKAPARRÁÐ



*Mynd 3. Nýggja tjóðarbúskaparráðið á sínum fyrsta fundi.*

Katrín Jakobsdóttir, forsætisráðharri, leiddi fyrsta fundin í tí nýggja tjóðarbúskaparráðnum. Á skránni var m.a. búskaparpolitikkur, vælferðartiltøk, sjúklingagjøld og grønir skattir.

Endamálið við ráðnum er at styrkja samskipanina av búskaparpolitikkinum og avgerðir á arbeiðsmarknaðinum, havandi í huga búskaparligt og samfelagsligt støðufesti og ávirkan á veðurlagsmál. Tjóðarbúskapráðið skal kjakast um støðuna í búskapar- og samfelagsmálum og røða um sambandið millum almenn fíggjarmál, peningapolitikkin og lønarviðurskifti í mun til uppgávuna í

búskaparpolitikkinum. Ráðið er mannað av forsætisráðharranum, fíggjarmálaráðharranum, ferðslu- og kommunumálaráðharranum (øll trý eru floksformenn fyri stjórnarflokkarnar), formanninum í kommunufelagnum, seðlabankastjóranum, formonnunum í fýra fakfeløgum og stjóranum í arbeiðsgevarafelagnum. Tilsamans 10 fólk eru í ráðnum.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## ÍSLENDINGAR OG BRETAR GJØRT NÝGGJA AVTALU UM FLYTFØRI



*Mynd 4. Sturla Sigurjónsson, aðalstjóri í ísl. Uttanríkisráðnum og Michael Nevin, sendiharri Bretlands í Íslandi, undirritaðu avtaluna.*

Íslendsku og bretsku myndugleikarnir hava gjørt avtalu um flyting millum londini, eftir at Bretland er farið úr ES og EBS, um farið verður úr ES uttan avtalu. Rætturin til at halda fram við at búgva, er longu tryggjaður við avtalum, men tann nýggja avtalan ger tað møguligt fyri íslendingar og bretar at halda fram við at flyta millum londini í arbeiðsella lestrarørindum og at fáa uppihaldsloyvi, sum er galdandi í minsta lagi í 36 mánaðir.
Avtalan er galdandi fyri tey, sum flyta millum londini frá útgongudegnum til endan av 2020.
Ísland og Bretland hava gjørt fleiri avtalur í sambandi við Brexit. Til dømis er flogferðslan tryggjað og galdandi tolltreytir fyri vøruhandil verða óbroyttar, hóast Bretland skuldi farið úr ES uttan sáttmála.

*Sí meira her (á íslendskum) og her (á enskum) + heimasíðan hjá ísl. stjórnini um Brexit her (á íslendskum)*

## NAKAÐ AV VIRKSEMI SENDISTOVUNNAR Í NOV. MÁNAÐI:

## ALTJÓÐA DAGUR Í HÁSKÓLA ÍSLANDS



*Mynd 5. Føroyski básurin, sum varð nógv vitjaður. Á myndini síggjast m.a. Beinir Bergsson (í reyðari blusu) og Björk Tórsdóttir (í hvítari troyggju) sum vóru Sendistovuni til hjálpar.*

6. november var altjóða dagur í Háskóla Íslands. Hetta er eitt árligt tiltak fyri íslendsk og altjóða lesandi, ið Háskóli Íslands skipar fyri. Mong lond vóru umboðað og nógvar sendistovur tóku lut og veittu kunning um lestrarmøguleikarnar í heimlandi sínum. Góður rómur var á fólki og møguligt var at smakka mat og drykk frá teimum ymsu londunum og eisini var tónleikaundirhald. Eins og áður, umboðaði sendistovan í Reykjavík Fróðskaparsetur Føroya og kunnaði um lestrarmøguleikarnar í Føroyum, við bóklingum og øðrum tilfari, og varð tað gjørt í samstarvi við Setrið. Tvey føroysk lesandi í Reykjavík, Beinir Bergsson og Björk Tórsdóttir, vóru so beinasom at vera sendistovuni til hjálpar og svaraðu spurningum frá teimum mongu vitjandi á føroyska básinum. Føroya Bjór studlaði við SISU, sum varð væl móttikið av teimum vitjandi. Tiltakið var væl eydnað og stórur

áhugi varð vístur møguligum lestri í Føroyum og landinum sum ferðamál.

## MÓTTØKA Í SAMBANDI VIÐ ICELAND AIRWAWES

Árliga Iceland Airwaves tónlistarhátíðin varð hildin dagarnar 6. – 9. november. Hópin av tónleikarum, íslendskum sum útlendskum, framførdu sum vant ymsastaðni í Reykjavík. Hesaferð framførdu tveir føroyskir bólkar, Heiðrik og Joe & The Shitboys.

Í hesum sambandi, skipaði Norrøna Húsið í Reykjavík, saman við norðurlendsku sendistovunum, fyri tiltaki í Norrøna húsinum leygardagin, 9. november. Hetta varð gjørt serstakliga fyri at promovera norðurlendsku bólkarnar. Eygleiðarar, fjølmiðlar og onnur áhugað í tónleiki, vórðu bodnir við til tiltakið saman við øllum teimum norðurlendsku luttakarunum. Nakrir av bólkunum framførdu hesaferð og vóna vit at øll londini verða umboðað næstu ferð. Ætlanin er, at hetta tiltak verður meira víttfevnandi og skal leggja enn meira áherðslu á, at marknaðarføra og promovera norðurlendskan tónleik, harundir føroyskan tónleik.




*Mynd 6. Sendistovan skipaði saman við hinum norðurlendsku sendistovunum og Norrøna Húsinum fyri einum promotion átaki í sambandi við Iceland Airwaves.*

## FØROYAR VIÐ Í NORDISK FILMFOKUS Í NORRØNA HÚSINUM

Sendistova Føroya varð, saman við hinum norðurlendsku sendistovunum, boðin á fund í Norrøna húsinum í Reykjavík fyri at kanna møguleikarnar fyri at fáa hóskandi filmar úr øllum Norðurlondunum vístar.

Stórur áhugi er fyri hesum tiltaki í øllum norðurlondunum. Ætlanin er at hetta tiltak skal vera 17. – 18. januar næsta ár. Sendistovan hevur verið í samband við Filmshúsið og ráðlagt føroysku luttøkuna. Ætlanin er at vísa ein føroyskan film og at føroyski filmsleikstjórin kemur at greiða nærri frá filminum, taka lut í pallborðsfundi o.a. Um sama mundið, sum hetta tiltak verður, fer fram Reykjavík Feminist Film Festival, so roknast kann við nógvum filmsáhugaum og nógv fólk frá filmsheiminum taka lut.

Norrøna húsið og norðurlendsku sendistovurnar hava tikið stig til at samstarva um ymsar verkætlanir og er hetta ein av teimum. Fyrr í ár hava vit samstarvað um útnorðurdagin og Iceland Airwaves. Aðrar samstarvsætlanir eru í umbúna.




*Mynd 7. Nordisk Film Fokus verður í Norrøna Húsinum 17. - 18. januar 2020 við føroyskari luttøku.*

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook